


# Kvinna fyllir 1 ár

11. november er eitt ár liðið, síðani fyrsta útgávan av Kvinnu kom út. Eitt árs fagnaðurin fer fram á www.kvinna.fo, har hópin av gávukortum verða burturlutað allan november mánað

Nú eitt ár er liðið, síðani Kvinna kom út fyrstu ferð, er lítið at ivast í, at hetta var blaðið, føroyskar kvinnur og ivaleyst fleiri menn, hava bíðað eftir. Móttøkan av blaðnum hevur verið sera góð, kjaksíðan kvinna.fo er vorðin ein tann mest vitjaða og umrødda í Føroyum og onki bendir á, at orkan hjá redaktiónini er minkað. Heldur tvørturímóti.

Til at hátíðarhalda alt hetta, fer Kvinna nú undir at luta burtur gávukort hvønn dag í hesum mánaðinum millum haldarar og luttakarar í kjakinum á kvinna.fo tann dagin.

**ave**

# Frits í Leikalund

**Fríggjadagin letur upp listaframsýning í Leikalund við myndum úr hugaverðini hjá bygdamanninum Frits Johannesen**



*Tónleikans heimur er afturvendandi myndevni í málningunum hjá Fritsi Johannesen*

LISTAFRAMSÝNING

Fíggjadagin 4. november kl 16 letur Frits Johannesen úr Fuglafirði upp málningaframsýning í Leikalund í Klaksvík. Hetta er triðja sýningin, ið Frits hevur í ár. Hann hevði eina sýning í gallerí Tøting í vár við vatnlitsmyndum, málningaframsýning í Gallerí Arleth á Falster frá februar til apríl umframt eina framsýning av málningum og vatnlitsmyndum í kirkjuni í Bagsværd í summar. Ætlanin var at hava eina framsýning í Gallarí Oyggin á Tvøroyri, men hendan varð avlýst orsakað av verkfallinum.

## Hugans heimur

Myndaevnini hjá Fritsi røkka frá natúrlýsingum, hugtøkum í tónleiki, næmingum til Manhattan í Mansgjógv í Fuglafirði. Frits er uppvaksin í Fuglafirði, har hann hevur verið lærari síðani 1967. Kórsangur og tónleikur hevur í mong ár verið hansara eitt og alt. Og tað er úr hesi hugaverð nøgvar av myndunum hjá Fritsi eru sprotnar.

Snjósóljugentan uppi á Manni í Blábjørgum er eitt skaldahugtak. Har vekir hon yvir Fuglafirði og Norðoyggjum, meðan hon við síni dýrabaru cello spælir síni løg fyri snjósóljuni, sum veksur uppi í hesi gjógv og fyri Manninum, sum so erpin stendur í síni mannfólkaverð og er ringur at tevsa.

Myndirnar hjá Fritsi eru eisini merktar av poppsangarum og klassiskum tónleikarum. Sjómaðurin er eisini við, og úr hesum jørildi eru føroyingar komnir.

Framsýningin í Leikalund verður at síggja fram til 30. november.

**ave**

# Frí kapping í luftini

**Loftferðslupakkin hjá ES letur upp fyri fullkomuligari fríari kapping á Føroya-rutuni. Hjá Atlantic Airways síggja tey hetta tó fyrst og fremst sum eina nýggja avbjóðing, ið gevur nýggjar møguleikar**

FLOGFERÐSLA

*Jákup Mørk*

Á landsstýrisfundi tann 31. oktober varð avrátt, at Føroyar nú skulu knýtast at loftferðslupakkanum hjá ES, ella teirri sonevndu ECAA-avtaluni.

Hetta merkir, at frá 1. januar 2007 verður latið upp fyri fríari kapping á føroya-flúgvingini, samstundis sum føroysk feløg - t.e. Atlantic Airways - eisini fáa møguleika at flúgva upp á rutur innan ES-lond í javnbjóðis kapping við flogfeløg í ES.

## Betri atkomuligheit

Tað føroyska virkið, sum fyrst og fremst kemur at merkja broytingarnar í hesum, er sjálvandi Atlantic Airways, sum í dag er einsamalt um Føroya-flúgvingina, men Magni Arge, stjóri, tykist á ongan hátt at vera ræddur um nýggju avbjóðingina.

- Alt hevur jú í minsta lagi tvær síður. Men her hjá okkum hava vit valt at síggja hetta sum eina nýggja avbjóðing, sum gevur okkum nýggjar møguleikar.

Spurdur, hvørjar ítøkiligar broytingar hetta kann geva hjá føroyska felagnum, sigur stjórin, at tað kanska er nakað trupult at siga her og nú.

- Tú kanst í øllum førum siga, at vit við hesum fáa betri møguleika at gera effektiva nýtslu av flotanum hjá okkum, sum nú telur fimm flogfør. Tí vit kunnu neyvan brúka øll hesi til bara at flúgva millum Føroyar og Danmark. Í dag gera vit sjálvandi eisini nýtslu av flogførunum til aðrar rutur, men í verandi støðu mugu vit hvørja ferð søkja um loyvi, um vit vilja víðka ferðslunetið hjá okkum. Eitt nú hava vit í summar flogið Føroyar-Aberdeen-Stansted, men tá hava vit ikki havt loyvi at taka ferðafólk millum Aberdeen og Stansted. Við nýggju avtaluni kunnu vit gera hetta, um vit hava hug. Ætlanirnar skulu tá bara fráboðast, so á tann hátt verður tað meira ómaksleyst hjá okkum at koma inn á ymsu ruturnar.

## Frátekur politiskari stýring

Hinvegin, so ásannar Magni Arge eisini, at broytingin kann seta nýggj krøv á Føroya-flúgvingini, sum í dag er krumtappurin í virkseminum hjá Atlantsflogi.

- Tað gevur jú øðrum sama møguleika at koma inn á okkara rutu, sum vit fáa hinvegin, og tað er sum so í tráð við tað, sum vit hava ynskt. Tá vit hava tosað við myndugleikarnar um broytingar á Føroya-rutuni, hava vit alla tíðina sagt, at treytirnar mugu vera eins báðar vegir, og tað er í grundini tað, sum nú er hent. Hinvegin haldi eg ikki, at verandi skipan hevur verið nøkur forðing sum so, tí myndugleikarnir hava altíð givið tilsøgn, tá umsóknir eru lætnar inn. Men tað frátekur politisku skipanini møguleikan fyri at stýra útboði og prísseting á rutuni. Og tað vil náttúrligt vera nakað, sum vit eisini skulu tillaga okkum.

Men vil Atlantic Airways ikki altíð hava ein náttúrligan fyrimun í júst hesi kappingini, tá tit hava tykkara heimstað í Føroyum?

- Tað vil so millum annað vera nakað av tí, sum kappingin í framtíðini kemur at snúgva seg um. Tá verða tað lutir sum marknaðarkunnleiki, heimstaður og annað, sum kemur at vera kappingarparametrini.

## Ikki nakar altjóða risi

Og ætlar Atlantic Airways sær nú í enn størri mun at gerast partur av hørðu kappingini á stóra europeiska marknaðinum?

- Sjálvandi gevur hetta okkum nakrar nýggjar møguleikar. Men tú skalt so ikki rokna við, at vit í næstum fara at operera kring alt Europa. Kappingin á marknaðinum er knallhørð, og vit eru alt ov veikir, tá talan er um málrættaða marknaðarføring í ymsu londunum. Og kunnleiki okkara til ymsu marknaðirnar er eisini rættiliga avmarkaður í so máta.

- Sum eg síggi tað, so verður tað framvegis okkara lutur at finna nakrar nisjur á marknaðinum, har vit kunnu útfylla nøkur tómrúm. Ella kanska at gerast liður í einum samstarvi hjá størri feløgum, sum onkursvegna hava tørv á okkara hjálp. Og so mugu vit bara síggja, hvussu tingini kunnu útvikla seg har og frá, heldur Magni Arge at enda.


**Seinasta freist at lata broytingar inn til telefonbókina 2006 er mánadagin 7. nov. 2005**




**Í mars 2006 verður telefonbókin borin út til allar fastnetstelefonfelagar í Føroyum. Virki, handlar og stovnar skulu boða frá av nýggjum, um lýst verður í Gulu síðum. Boðast skal eisini frá, um verandi lýsing ynskist óbroytt.**

**Hvítu síður**

Mánadagin 7. november 2005 er seinasta freist at koma við rættingum til Hvítu síður í Telefonbókini fyri ár 2006 (vanliga telefonyvirlitið). Rættingarblað til Hvítu síður er á síðu 676 í Telefonbókini 2005,og skal sendast til: Kundaskráseting, Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn ella faks 31 93 01.

**Eykaupptøkur v.m.:**
Umframt rættingar til navn, bústað, telefonnummar, o.s.fr. ber eisini til at gera nakað serligt burturúr júst tínum telefonnummari við undirstrikingum, eykaupptøkum og/ella undirupptøkum. Prísurin er 62,50 kr. (íroknað mvg) fyri hvørja undirstriking, eykaupptøku ella undirupptøku.

**Búmerki:**
Eisini ber til at umbiðja búmerki í Hvítu síðum. Prísurin fyri búmerki er kr. 2.000,00 (ikki íroknað mvg) fyri hvørja upptøku.

**Gulu síður**

Mánadagin 7. november 2005 er seinasta freist at boða frá **av nýggjum**, um upptøka ynskist í Gulu síðum.

**Prísir:**

| | | |
|---|---|---|
| (A) Standardlýsing | kr. | 700,00 |
| (B) Innramming | kr. | 800,00 |
| (E) Grafisk lýsing fyri mm (min. 30 mm) | kr. | 25,00 |

(sí dømi á s. 674 í Telefonbókini 2005)

**Litlýsingar:**
Umframt vanligar svart/gular lýsingar, er eisini møguleiki at lýsa við hvítari bakgrund og við litum. Eykakostnaður fyri hvíta bakgrund er kr. 500,00 og fyri litir við hvítari bakgrund kr. 1.250,00.
Skrásetingar-/rættingarblað til Gulu síður er á síðu 675 í telefonbókini 2005, og skal sendast til:
Føroya Tele, Postboks 27, FO-110 Tórshavn, ella faks 32 11 66.
**GG: Prísirnir á Gulu síðum eru uttan mvg!**

tel 30 30 30 www.tele.fo www.nummar.fo · info@nummar.fo - www.gulu.fo · info@gulu.fo FØROYA TELE